# MISSA 391 MIÓ Í SKATTI UM ÁRIÐ

**SERSKIPANIR** Hvørt ár missa landskassin og kommunurnar skatt frá yvir 4000 føroyingum, tí tey hava ymsar serligar skattaskipanir

Áki Bertholdsen

– Hetta er eitt mál, sum vit mugu tora at tosa um.

John Johannessen, politiskur formaður Javnaðarfloksins, reisti ein rættiliga umstríddan spurning á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum í Trongisvági leygardagin.

Og tað er spurningurin um allar teir nógvu føroyingarnar, sum arbeiða undir ymsum serligum skipanum.

## Samhaldsfesti í samfelagnum dettur sundur

JOHN JOHANNESSEN

Hetta eru skattaskipanir, sum ávísum førum gera, at teir sleppa lættari skatti. Men í øðrum førum gera hesar serskipanir tað, at teir betala skatt, men at landið so betalir reiðarum skattin aftur í stuðuli.

Undir øllum umstøðum eru hetta skattainntøkur, sum landið og kommunurnar missa, staðfestir John Johannessen.

### Sjeyndi hvør føroyingur

Hann sigur, at veruleikin er, at sjeyndi hvør føroyingur hevur onkra serliga skipan, sum førir við sær, at samfelagið missur skattainntøkur.

Talan er um yvir 4.000 løntakarar av teimum 30.000, sum eru í Føroyum, sum ikki rinda skatt eftir sama leisti, sum øll hini.

Men samstundis sum at landið og kommunurnar missa skattin frá hesum fólkunum, fáa tey akkurát somu tænastutilboð frá tí almenna til skúla, heilsuverk og annað, sum øll onnur hava.

John Johannesen stúrir eisini fyri rákinum, sum nú er uppi í tíðini um, at fleiri og fleiri skattir verða gjørdir til brúkaragjøld.

Hetta eru nevskattir, har øll betala líka, sama, hvussu nógv tey annars hava í løn.

– Og tað rakar tey lágløntu harðari enn tey hægri løntu, staðfesti politiski formaðurin í Javnaðarflokkinum.



MISSA INNTØKUR

*– Tað vísir seg sum um at Javnaðarfólk tora illa at viðgera málið, men tað sleppa vit ikki undan, heldur John Johannessen, politiskur formaður Javnaðarfloksins*

## Dýrt fyri útjaðaran

**Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, fegnast um, at John Johannessen hevur tikið hendan eyma spurningin upp.**

**Hon staðfestir, at øll hesi fólkini eru vælkomin í teimum kommununum, tey búgva í.**

**– Men veruleikin er, at tey flestu av øllum teimum, sum eru undir hesum serligu skattaskipanum, búgva í útjaðaranum og tí kostar hetta kommununum kring landið øgiliga dýrt í mistum skattainntøkum, sigur Kirstin Strøm Bech.**

## 391 milliónir

| Skatta-Skipan | Tal av fólki | Mistar milliónir |
|---|---|---|
| DIS | 502 | 168,0 |
| FAS | 511 | 117,5 |
| Fiskimenn | 2.620 | 80,4 |
| Farmaskip | 320 | 25,0 |
| **Tilsamans** | **3.953** | **390,9 mió** |

*Hendan talvan vísir, hvussu nógv føroysk sjófólk sigla undir ymsum serskipanum, hvat skatti viðvíkur, bæði DIS og FAS, umframt tey, sum fáa fiskimannafrádrátt og tey, sum sigla við farmaskipi og fáa frádrátt fyri tey.*

*Her til skal viðmerkjast, at ongi tøl eru fyri tey, sum sigla undir NIS, sum er tann norska serskipanin fyri sjófólk*

### Mugu tora

Hann staðfestir, at nú á døgum verður nógv tosað um, hvussu neyðugt tað er at fara undir nýskipanir á ymsum økjum í samfelagnum fyri at varðveita vælferðarsamfelagið.

Hesum er hann samdur í. Men hann heldur, at tað er ein nýskipan, sum er gloymd og tað er ein nýskipan á skattaøkinum.

– Vit mugu nú sum skjótast undir at endurskoða alla skattaskipanina og útgreina hvussu hon skal vera samansett, so at hon lýkur tey krøv, sum Javnaðarflokkurin setir til eina skattaskipan, har teir breiðastu herðarnir bera tær tyngstu byrðarnar.

## Hetta er neyðugt fyri at framtíðartryggja vælferðarsamfelagið

JOHN JOHANNESSEN

Hann segði, at onkusvegna tóktist tað sum um, at javnaðarflokkurin tordi illa at taka hetta málið upp, men tað má gerast, helt hann.

– Hetta er ein serstakliga týdningarmikil partur í strembanini eftir at framtíðartryggja vælferðarsamfelagið, segði John Johannessen.

Hann leggur afturat, at vit royna at byggja upp eitt samhaldsfast samfelag, har øll vilja gera sítt til felagsskapin.

– Men samhaldsfesti dettur burtur, tá ið vit hava so nógvar serskipanir, sigur politiski formaður Javnaðarfloksins.

Hetta leggur eisini upp til at skeivleiki kemur í aðrar skipanir, tí hjá hóast inntøkan hjá nógvum av hesum fólkum er høg, stendur null á sjálvuppgávuni og tað elvir so eisini til sosial fríplass í barnagørðum og aðrar ágóðar.

aki@sosialurin.fo